


**Vegleiðing í samband við andlát og jarðarferðir úr Siloa**

***Bønarhald:***

Tá ið kistan fer frá heiminum ella sjúkrahúsinum og í salin, er vanligt at hava stutt bønarhald á báðum støðum. Vanliga er tað tveir sangir og eitt stutt orð. Her mugu so **sangir** verða valdir, og **spælari** og **onkur at siga nøkur orð,** biðjast.
Vanliga verða tveir bidnir: ein í heiminum ella á sjúkrahúsinum og ein í salinum.

***Jarðarferðin:***

Til jarðarferðina skulu biðjast:

- Spælari
- Ein at byrja og ein at enda
- Talari
- Ein at siga nøkur orð á grøvini

Viðvíkjandi sjálvari jarðarferðini er hetta bert ein vegleiðing. Tað er sjálvandi upp til tey avvarðandi, hvussu tey vilja hava jarðarferðina at fara fram.

Samkoman í Siloa vil fegin vera til hjálpar á allan hátt, nú sorgin hevur rakt.

Tann, ið tey avvarðandi kunnu seta seg í samband við hesum viðvíkjandi, er:

**Høgni K. Hansen**
**Torkilskrókur 10**
**Fuglafirði**
**Tlf. 744125**

*Heilsan við djúpari samkenslu*

"...Tú, HARRI, hjálpir mær og troystar meg! (Sálmur 86:17)

"Eg, Eg eri tann, sum troystar tykkum". (Esaias 51:12)

"...Faðir miskunnar og Gud alrar troystar" (2. Kor. 1:3)